# Byrja nú at bora tunnil ímillum Øravík og Hov

**Landsverkfrøðingurin sigur, at byrjað verður uppá tunnilin ímillum Øravík og Hov í juni mánað í ár**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Nú hómast endin á tí tíðarskeiði, tá ið suðuroyingar máttu koyra allan vegin upp um Hovsegg fyri at sleppa ímillum syðra og norðara part í oynni.

Samstundis verða endalig stig nú tikin til at bøta um vánaligasta landsveg í Føroyum, í hvussu so er á teimum stóru oyggjunum.

Tí nú verður nevniliga farið undir at bora tunnil ímillum Øravík og Hov.

Tá ið fíggjarlógin varð til viðgerðar beint fyri jól, varð nevnt, at tá ið tunnilin til Gásadals var liðugur, skuldi útgerðin flytast til Suðuroyar, tí so skuldi byrjast uppá tunnilin ímillum Øravík og Hov beinanvegin.



*Hetta er høvuðsferðsluæðrin í Suðuroynni, nú vit eru farin inn í 21. øld.. Men hetta vita løgtingslimir alt um, tí myndin er tikin, tá ið løgtingslimir vóru í Suðuroy í september og tað er júst løgtingslimir, sum eru í bussinum á myndini. Men nú verður hesin vegurin skjótt søga*

*(Mynd: Leivur Nygaard)*

### Útgerð og manning suður

Og nú váttar Landsverkfrøðingurin at so verður!

Hann sigur, at tá ið arbeiðið at gera Gásadalstunnilin er liðugt, verða bæði útgerð og manning flutt til Suðuroyar, tí tá verður byrjað uppá tunnilin ímillum Øravík og Hov.

Arbeiðið at sprongja ogt bora í Gásadali verður liðugt heilt skjótt, men so er eftir at tryggjað tunnilin og at gera teir seinastu snøklarnar liðugt og tað tekur nakrar mánaðir afturat.

Landsverkfrøðingurin sigur, at gongst sum ætlað, verður byrjað at bora tunnilin ímillum Øravík og Hov í juni, men møguliga verður arbeiðsplássið rigga til eitt sindur áðrenn.

Byrjað verður at bora norðaru megin.

Í ár eru sjey milliónir settar av á fíggjarlógini til tunnil ímillum Øravík og Hov og tað væntar Oyvindur Brimnes verður nóg mikið til at hava arbeiðið gangandi tað, ið eftir er av árinum.

Hann væntar, at umframt at rigga arbeiðsplássið til, fer tað at bera til at bora nakrar hundrað metrar inn í fjallið fyri játtanina í ár.

Spurningurin er so, nær tunnilin verður liðugur.

– Tað veldst alt um, hvussu stór játtanin til arbeiðið verður. Tað hevði borið til at bora ígjøgnum uppá hálvtannað ella tvey ár, men tað er nakað eftir at gera, áðrenn tað kann takast í nýtslu. Men hvussu skjótt tað gongur, veldst í mestan mun um, hvussu stór játtanin verður.

Tunnilin ímillum Øravík og Hov verður 2100 metrar langur. Landsverkfrøðingurin mintist ikki akkurát í høvdinum, hvussu nógv hann kostar. Men í einum skjali, sum varð handað fíggjarnevndini, tá ið hon viðgjørdi fíggjarlógina fyri í ár, verður upplýst, at tilsamans er arbeiðið mett at kosta 126 milliónir.

Sjálvur tunnilin er mettur at kosta 84 milliónir, vegagerðin norðanfyri er mett at kosta 28 milliónir og vegagerðin sunnanfyri er mett at kosta 14 milliónir.

Tilsamans skulu 2800 metrar av vegi gerast norðanfyri tunnilin og 1400 metrar av vegi sunnanfyri.

### Politisk neyðsemja

At tunnilin ímillum Øravík og Hov verður gjørdur nú, er ein politisk neyðsemja í samgonguni, tí tað er minst eitt ár fyrrenn enn upprunaliga ætlað.

Einferð stóð hesin tunnilin á langtíðar fíggjarætlanini hjá landsstýrinum til at byrja í 2004 og onkuntíð hevur tað eisini verið nevnt, at tað varð enn seinni at farið varð í holt við hann.

Men nú Vágur verður slept sum samferðsluhavn hjá Smyrli, endaði tað við, at tunnilin verður framskundaður ístaðin fyri at gera sambandið ímillum norðaru og syðru helvt í Suðuroynni nøktandi, tí tað hevur verið tann størsti fløskuhálsurin í samferðsluni í Suðuroynni í mong ár.

# Hóttan frá Jenis av Rana loysir ongar trupulleikar

**– Tað er heilt burturvið, at Jenis av Rana hóttir samgonguna í einum máli, sum full semja er um, sigur Kári Højgaard, sjálvstýrismaður í samgonguni**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*

–Tað er ringt at taka Jenis av Rana í í álvara.

Kári Højgaard, sjálvstýrismaður í samgonguni, heldur lítið um, at Jenis av Rana í Sosialinum mikudagin hóttir við at rýma úr samgonguni, verður nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum ikki tikin í nýtslu at kalla beinanvegin eftir at hann verður liðugur á Ólavsøku.



*Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum fer ikki at standa tómur leingi, sigur formaðurin í fjórða samgonguflokkinum, sjálvstýrisflokkinum*

Í mikudagsblaðnum høvdu vit verið so gáloysin at gloyma, at eisini sjálvstýrisflokkurin er í samgongu.

Men tað eru teir sanniliga og einasti tingmaður teirra, Kári Højgaard, heldur ikki, at tað er serliga fremjandi fyri samstarvið í samgonguni, at hótta við slitið í fjølmiðlunum, heldur enn at føra síni sjónarmið fram í samgonguni.

– Tá ið Jenis av Rana brúkar Landssjúkrahúsið at hótta samgonguna við, er tað heilt burturvið.

Hann sigur, at tað eru ikki meiri enn tríggjar vikur síðani, at Jenis av Rana atkvøddi fyri eini fíggjarlóg.

– Tá hoyrdist ikki eitt kis frá honum og tað loysir ongan trupulleika at hótta samgonguna í fjølmiðlunum.

– Jenis av Rana veit eisini, at nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum er eitt mál, sum øll samgongan er samd um at raðafesta ógvuliga høgt.

– Samgongan hevur tosað nógv um nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum og tað er púra greitt fyri samgonguni, at málið skal loysast.

Sostatt er ongin sum helst orsøk hjá Jenisi av Rana at hótta í fjølmiðlunum.

– Og eg vænti avgjørt ikki, at nýggi bygningurin kemur at standa tómur í nógvar mánaðir, tí samgongan er samd um at loysa trupulleikan sum skjótast.

Kári Højgaard sigur, at hetta er eisini eitt mál, sum samgongan í fíggjarnevndini tosaði nógv um og eisini hon er samd um, at trupulleikin skal loysast. Og tað er ein viðgerð, sum Jenis av Rana hevur verið við í alla tíðina.

– Vit eru samdir um, at málið skal loysast og vit eru samd um, at arbeiðið skal ikki dýrka av tí, at tað verður lagt stilt av væntandi játtan fyri síðani at verða tikið uppaftur seinni.

Tingmaðurin vil kortini ikki siga, hvørja loysn talan hevur verið um, men aðrir hava nevnt møguleikan at samtykkja eina verklagslóg, so at útgerðin kann bíleggjast beinanvegin, men at hon so verður goldin næsta ár, ella yvir eini tvey ár.



# Atlantis hevði 15.000 vitjanir í 2002



*Jógvan Eliasen, dagligur leiðari í í Atlantis, vónar, at karmarnir í húsinum verða betri í 2003. Tó er hann væl nøgdur við árið í fjør*

**Mentanarhúsið Atlantis í Klaksvík hevði heilar 15.000 vitjanir í fjør. Dagligi leiðarin, Jógvan Eliasen, vónar, at talið fer at hækka til 20.000 komandi ár**

MENTANARHÚS
*Ingrid Bjarnastein*

**Klaksvík:** – Eftir umstøðunum gekk tað fínt í fjør, sigur Jógvan Eliasen, dagligur leiðari í Mentanarhúsinum Atlantis.

Vitjunartalið kom upp á yvir 15.000 vitjanir, og kann tað sigast vera ógvuliga gott, tá hugsað verður um karmarnar húsið hevur at virka undir.

– Biografurin er tað drívandi í húsinum. Vit sýna filmar fimm kvøld um vikuna – frá mikudegi til sunnudag. Viðhvørt eru tveir filmar hvørt kvøldið, so rundaða talið kemur helst upp á eini 5-600 sýningar um árið.

Leiðarin eftirlýsir tó miðaldrandi fólk, av tí, at tey flestu, ið ganga í biograf eru ungdómar.

– Nú er at fara at venja miðaldrandi fólk aftur við at fara í biograf, tí tað eru ógvuliga fá tilkomin, sum koma her at hyggja eftir einum filmi.

### Hentleikar

Jógvan Eliasen sigur, at húsinum vantaði nógvar hentleikar, og er seinastu tíðina roynt at fingið hetta upp á pláss. Millum annað hevur húsið fingið eina nýggja atgongumerkjaskipan og eisini eina nýggja uppvarping, sum ger tað møguligt at hava framløgur á stórskýggjanum niðri í salinum.

– Pengarnir strekkja ikki so langt, so alt má gerast so hvørt. Nú vit hava fingið ein nýggjan uppvarpara gevur tað okkum møguleika til at brúka hølini øðrvísi, greiðir Jógvan frá.

Sjónleikarafelagið heldur eisini til í Atlantis, og henda morgunin Sosialurin var á gátt, var ein flokkur frá Tekniska skúla og hugdi eftir einum dvd-filmi í samband við undirvísing.

– Húsið stendur tómt í dagtímunum, og er tað har eg hevði ynskt, at tað varð meira brúkt. Til dømis sum í morgun, tá Tekniski skúlin er her. Barnaansingin var eisini inni her einaferð í fjør til eitt tiltak, har Karl Martin sang fyri børnunum. Tað er jú upplagt at húsið verður brúkt til slík tiltøk.

Tá spurt verður um kappingina frá Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sigur Jógvan, at hetta kann als ikki samanberast. Hann heldur, at tað er næstan skeivt at kalla Atlantis fyri eitt Mentanarhús.

– Hetta er bara ein biografsalur við einum palli. Vit hava als ikki somu umstøður sum húsið í Fuglafirði, og kunnu als ikki bjóða tað sama. Vit hava heldur ikki orku til at arbeiða við at fáa stór nøvn henda vegin, tí grundarlagið fyri inntøku er so lítið.

Yvir 20 ymisk tiltøk vóru í Atlantis í fjør. Tað verið seg konsertir, sjónleikir, politiskir fundir og annað.

– Mítt størsta ynskið fyri 2003 er, at vit sleppa at byggja út á loftinum. Vit hava eitt loft, sum stendur óinnrættað, og har hevði eg kunnað hugsað mær, at vit fingu nøkur høli, sum vit kunnu brúka til fund.

Klaksvíkar kommuna hevur játtað at gjalda tað, ið skal til, um landið játtar at gjalda sín part. So í løtuni verður bara bíðað eftir svarið frá Mentamálaráðnum.

– Men við vælvild frá Mentamálaráðnum, so fara vit at hava eitt innrættað loft í summar, sum vit kunnu taka í nýtslu.

Leiðarin leggur stóran dent á, at hølini eru ikki egnað til størri tiltøk. Salurin tekur bert 120 fólk, og setur tað avmarkingar í sær sjálvum. Ongin køkur er og onki veitsluhøli.

– Eg haldi, at tað hevði verið áhugavert at funnið útav, hvat Klaksvíkin ætlar við mentanini her í býnum. Tí tá undirsjóvartunnilin kemur, verður tað spennandi at síggja, um vit ætla at útflyta mentanina, ella um vit vilja, at fleiri skulu koma hendan vegin.

Men samanumtikið er Jógvan Eliasen ógvuliga væl nøgdur við, hvussu 2002 hilnaðist. Hann vónar tó, at talið á vitjandi fer at hækka til eini 20.000 í ár.

